# Søkt verður eftir deildarstjóra til nýggju KT-fyrisitingina á Gjaldstovuni

**KT-fyrisitingin er nýtt virkisøki hjá landinum. Fyrisitingin skal verða skipað soleiðis, at hon kann arbeiða strategiskt og á høgum fakligum stigi.**

Endamálið við KT-fyrisitingini er at samskipa KT á yvirskipaðum stigi, so at tað almenna fær munadyggar loysnir.

**Ábyrgdarøkini eru í høvuðsheitum at:**

- skipa og varða av felags KT-undirstøðukervi (Landsnet)
- standa fyri felags KT-loysnum og taka sær av yvirskipaðu tvørstovnaligu atlitunum
- samskipa fakskipanir, men ikki eiga tær
- byggja upp førleikar um KT-verkætlanarleiðslu, KT-sáttmálar, lisensavtalur og rakstraravtalur
- stuðla og ráðgeva serliga smáu stovnunum, tá ið ræður um KT
- samskipa lisensviðurskifti og onnur kostnaðarmikil KT-keyp

**Førleikar:**

Fyrisitingin skal vera savnandi og fáa undirtøku fyri m.a. felags loysnum. Neyðugt er at arbeiða formliga og miðvíst. Týðandi partur av arbeiðinum hjá KT-fyrisitingini verður at skipa arbeiðið tvørtur um stovnsmørk. Tí eru fakligir førleikar, trúvirði, yvirlit og evni at samskifta og savna týðandi førleikar.

Tú skalt hava hægri útbúgving, holla vitan um KT og royndir á økinum. Best er, um tú hevur útbúgving í KT, hevur arbeitt við KT-loysnum og hevur royndir at arbeiða í verkætlanum. Tað er eisini fyrimunur at hava royndir at leiða starvsfólk.

**Setanarviðurskifti:**

Starvið er lønt í 37. lønarflokki hjá tænastumonnum landsins. Í eftirlønargjaldi verða goldin 15%. Starvið er ikki tænastumannastarv, men verður sett eftir viðkomandi sáttmála.

Umsóknarfreistin er týsdagin 24. mars í 2009. Umsóknin skal verða stílað Gjaldstovuni, Postboks 2009, 165 Argjum.

Er okkurt at spyrja um viðvíkjandi starvinum, kanst tú ringja til Leif Abrahamsen á 35 24 50 ella á fartelefon 21 46 60.

Avtalan millum Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovuna um KT-fyrisitingaruppgávuna er á www.gjaldstovan.fo

**Um Gjaldstovuna:**

Virksemisøkið á Gjaldstovuni verður broytt, so at Gjaldstovan, umframt at hava kjarnaførleika í roknskaparhaldi o.t., eisini skal hava kjarnaførleika í KT.

**Gjaldstovan verður skipað í fýra høvuðsøki:**

- KT-fyrisiting (net, felagsloysnir, samskipa fakskipanir, ráðgeva og gera avtalur)
- Roknskapardeild (yvirskipaðar roknskaparuppgávur, bókhald, gjaldingar og leiðslukunning)
- Lønardepil (seta upp lønarskipan, lønarbókhald, ráðgeving og leiðslukunning)
- Kervisfyrisiting (reka Búskaparskipan landsins)

Í KT-fyrisitingini starvast í løtuni 8 fólk, sum øll eru knýtt at netfyrisiting. Á Gjaldstovuni starvast okkurt um 40 fólk. Til samans eru um 1500 fólk, ið brúka skipanirnar, sum Gjaldstovan fyrisitur.

Felags fyri virksemið hjá Gjaldstovuni verður framhaldandi at skapa munadyggar KT-fyrisitingarloysnir og at hava neyvt samskifti við stovnarnar.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Føroya Gjaldstova

# Altjóða kvinnudagur 2009



## Norðurlandahúsið sunnudagin 8. mars kl. 14-18

- Lisbeth Nebelong: Frá undirskoti til yvirskot
  – tveir tímar við fyrilestri og workshop um privatøkonomi
- Katrin Petersen, journalistur, hugleiðir um íbornu kynsrollurnar
- Studentaskúlanæmingar framføra eina variatión yvir *Eitt dukkuheim* hjá Ibsen
- Elin x 2 – um at vera ein almennur persónur og stjóri, sum øll hava sína hugsan um
- Kvinnukórið Cantabile
- Synergi: Er ljósareytt óseriøst?
- Framsýning við Amnesty Føroya deild og SEV

Kvinnufelagið í Havn og Kvinnufelagasamskipan Føroya

Stuðlað hava: Mekta · Tryggingarfelagið Føroyar · Ikon · Norðurlandahúsið · Føroya Banki · Sosialurin · Føroya Bjór